

# Jól við Gjógv og í Rovaniemi

**Í heyst var Petur Jakku Sigvardsen á ferð í finska býnum, Rovaniemi. Har búði hann á gistingarhúsinum hjá jólamanninum og vitjaði jólabýin, sum liggur beint við polarsirkulin. Jólini í dag, kunnu ikki samanberast við tey, sum sjeyti ára gamli Petur Jakku skrivar um í frálíku bókum sínum um Gjáar søgu**

JÓL OG BARNAMINNIR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

– Vit børn ivaðust ikki í, at jólamaðurin var veruleiki. Tað ráddi nógv um at skikka sær væl og tá serliga til jóla, tí jólamaðurin fylgdi væl við atburði barna, og vart tú ólátaður, var vandi fyri, at tú onga jólagávu fekk frá honum. Og hvør minnist ikki skommina, tað var at verða jólaskekil!

Áðrenn farið varð til songar jólaaftanskvøld, hongdu foreldrini eina hosu á songarstokkin, sum jólamaðurin so skuldi fylla um náttina, meðan tú svavst. Soleiðis sigur Petur Jakku Sigvardsen frá jólunum á barndómsbygd sínari, við Gjógv.

Vit geva Petur Jakku orðið:

Tað var satt at siga ikki altíð so skjótt at sovna hetta kvøldið, tí alla tíðina lást tú og hugsaði um jólamannin, nær hann mundi fara at koma – og ikki minst hvussu hann kom, tí sjálvur helt tú tað vera dekan og løgið, at hann skuldi koma niður ígjøgnum skorsteinin. Men altíð var ov drúgt at bíða, so tú sovnaði, og tá ið tú so fekk eyguni upp jólamorgun, hekk tann fylta hosan sum vant á songarstokkinum.

Tað fyrsta, smábørnini gjørdu, tá ið tey vaknaðu jólamorgun, var at hyggja eftir, hvussu vorðið var við hosuni, ið hongd var á songarstokkin kvøldið fyri, og stór var frøin, tá ið sást, at jólamaðurin enn einferð hevði fylt hana við appelsinum, súreplum og bommum.

Har sat so barnið í seingini og gleddist um alt hetta átuliga, sum kom á dýnuna, tá ið hosan varð tømd. Okkurt bommið fór kanska í munnin; men tað mesta mátti goymast og tað væl, tí tað skuldi vara øll jólini.

Tá ið so foreldrini komu inn jólamorgun og bóðu "gleðilig jól", varð sjálvandi fyrst tosað um jólamannin og hosuna.

Men tað var eisini eitt annað, sum barnið gleddi seg til jólamorgun, og tað var at sleppa í tey nýggju jólaklæðini, sum móðir legði á seingina: nýggjar, dimmar buksur niður á knæ, myrkamorreyða troyggju í vøkrum mynstrum, langar myrkamorreyðar hosur og matrósahúgvu.

Tað var ein glaður og ikki sørt errin smádrongur, sum kom inn í køkin í hesum nýggju jólaklæðunum, og móðir eins og hini húsfólkini vóru helst líka fegin um úrslitið.

Tað var annars so undarligt at koma inn í køkin jólamorgun, tí alt tað, tú vart vanur at síggja aðrar dagar so sum rokk, strá, karðar, stokkar, villar, troyggjur, ull og mangt annað, var brádliga beint burtur.

Nú angaðu øll húsini av grønsápu og væl vaskaðum viði. Í køkinum tevjaði tú eisini enn angan av teimum kókaðu kleynunum, sum foreldrini høvdu kókað, eftir tað at tú vart farin til songar jólaaftanskvøld, og somuleiðis av jólakøkuni, ið tú fekst smakkin av jólamorgun aftur við drekkanum.

Til jóla var gjørt serliga væl reint bæði innandura og uttandura. Køkur vórðu bakaðar, alt tøtingararbeiðið var fyribeint, útiarbeiðið mestsum dovnaði burtur, gestir komu til bygdar, og konufólkið stákaðist við at fáa jólaklæðini frá hondini.

Skúlabørnini fingu ikki jólafrí fyrr enn tollaksmessudag. Teir seinastu skúladagarnar plagdu vit at fáa jólasøgur. Men tá máttu vit eisini venja serliga nógv teir jólasálmarnar, vit skuldu syngja í kóri á kirkjuloftinum jólakvøld.

Av tí at ljós var í stovuni í flestum húsum, so kendist tað, sum lá ein hátíðarglæma yvir allari bygdini á jólum.

Vit smábørn góvu okkum far um, at menn møttust yviri í Túni, á Gjónni og ymsa aðrastaðni, og at teir síðani stukku inn á gólvið hvør hjá øðrum.

Sum kvøldið leið, fóru menn at ganga í stórum troppum, sum sagt varð tá á døgum (konufólk mundu tá gera lítið og einki við tað váta slagið). Summir skonktu inni, og tú sást skuggarnar fyri vindeyganum av lívligum monnum, ið tóku hendur saman á køksgólvinum, ella teir bert stóðu har so andbráðir og prátaðu við húsfólkið.

Aðrir vóru hulisligari við tí váta slagnum, sum teir goymdu í ymsum úthúsum. Tí sást tú eisini, at teir leitaðu sær inn í kjallarar, hoyggjhús og hjallar at fáa sær ein lítlan. Undarligt soleiðis at síggja allar hesar gløðandi sigarettirnar ferðast millum húsaskjøldrar, skýmaskot og úthús, til tær so aftur savnaðust og fóru sum á træðri eftir gøtuni við kvøðing og miklum málageipi.

Tá ið so tropparnir komu í dansistovuna, byrjaði dansurin av álvara, og smábørnini leitaðu sær út fyri dyr og heim, tí ikki dámdi teimum eldru, sum nú leitaðu sær í dans so at siga einasta kvøld á árinum, at børnini skuldu ganga og vála úti eitt tílíkt kvøld.

Sum leið út á náttina, fækkaðist fólkið í dansistovuni. Onkur hevði kanska fingið í meira lagi av tí sterka løginum og var sovnaður, og onnur leitaðu sær so við og við heim, sum liðið var á náttina.

Tá ið skrímdi fyri degi, stóð so bert ein einsamøll petroleumslampa eftir og lýsti í einum horni í tómari dansistovu.

Um jólini er ikki stórt meira at siga, uttan at lærarin plagdi at hava jólatræ fyri okkum skúlabørnum í skúlanum. Har var altíð stúgvandi fult av fólki, og jólasálmarnir ljómaðu fagurliga frá bæði ungum og gomlum. Vit smábørn plagdu eisini at fáa eitt litfagurt kramarhús av góðgæti heim við okkum, og tað var vorðið sum gáva, ið gleddi barnahjartað.



# *Jólagleði*

*Í tí myrku jólatíð*
*foldin hvít yvir ong*
*skalvur í brekku og líð*
*glerpípur undir fossum og homrum.*

*Stjørnan lýsir bjørt*
*yvir frostbitin fjøll*
*av manna verum ei rørt*
*til gleði fyri okkum øll.*

*Ljósið frá Betlehems vøll*
*hómast enn so kært*
*sum vegin oss vísir inn í Himnahøll*
*takk at tú hjá okkum vart.*

*Harrans gleði gevur hita*
*lat hetta fast í minni sita*
*ei køva logan lat ljósið lýsa*
*sum bjartan vita.*

**Viggo Olsen**



Viðskiftafólki okkara takka vit fyri gott samstarv í farna árið, gleðilig jól og gott nýggjár

BI GA
Køkar gjørdir við nærlogni

Fæst í bókabúðunum og í Auto



Lesið Sosialurin -tað loysir seg



Sølu- og marknaðarstjóri til Smyril Line

Smyril Line hevur avgjørt at savna alt ferðafólkavirksemið í eina sølu- og marknaðar-deild og søkir tí eftir einum dugnaligum sølu- og marknaðarstjóra at standa fyri framhaldandi menningini av virkseminum.

Tað liggur ein stór leiðsluuppgáva í at sameina, leiða og menna tey meira enn 40 starvsfólkini, sum nú skulu savnast í eina sølu- og marknaðardeild.

**Ábyrgdarøkini og arbeiðsuppgávurnar hjá sølu- og marknaðarstjóranum verða:**
- Fáa sum mest burtur úr sølu- og marknaðarvirkseminum - innanhýsis og uttanhýsis
- Áhaldandi meta um marknaðarvirksemið og úrslitið av hesum
- Skipa kundabólkar og menna tænastur
- Gera greiningar og uppskot um nýtt virksemi
- Skipa fyri tænastumenning
- Evna til, leggja fram og seta í verk sølu- og marknaðarætlanir
- Leiða og eftirmeta marknaðarvirksemið hjá deildunum uttanlands
- Stuðla aðalsøluumboðunum og samráðast við tey um virksemi
- Eftirmeta sølu- og marknaðarvirksemið hjá aðalsøluumboðunum
- Læra upp og menna sølufólkini á deildunum og hjá aðalsøluumboðunum
- Leggja fíggjarætlanir og eftirmeta sølumálini

*Roknast skal við nógvari ferðing í starvinum.*

**FØRLEIKAKRØV**
Til tess at kunna røkja starvið hevur sølu- og marknaðarstjórin helst eina sølubúskaparliga útbúgving sum t.d. cand.merc. ella HD í sølu. Harumframt eigur hann at hava drúgvar leiðsluroyndir - helst í altjóða høpi - frá eini sølu- og marknaðardeild.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur kunnleika um ferðavinnu.

Tað hevur týdning, at tann, ið settur verður, er vanur at arbeiða við søluumboðum og hevur góðan kunnleika at leiða dótturfeløg ella deildir - serliga í samband við broytingar-tilgongdir.

Starvið hevur sostatt í sær bæði leiðslu, sølu og marknaðarføring. Umsøkjarar við hollum royndum innan leiðslu í sølu verða tó tiknir framum.

Sølu- og marknaðarstjórin skal vera fyrikomandi og vera vanur at tosa við fólk á øllum stigum í samfelagnum. Tað hevur týdning at hava royndir í at leggja fram nýtt virksemi og nýggjar vørur og á tann hátt vera førur fyri at skapa motivatión og eldhug hjá starvsfólkum og samstarvsfeløgum.

Tað skal vera ein natúrligur eginleiki hjá umsøkjaranum at vera stigtakari og koma við uppskotum um nýtt virksemi, eins og hann skal duga at røkka settum málum og úrslitum. Eftirmeting av marknaðarætlanum, virksemi og fíggjarætlanum skal vera eitt vælkent amboð í hondunum á nýggja sølu- og marknaðarstjóranum.

Umsøkjarin skal duga enskt á høgum stigi bæði í skrift og talu.

Sølu- og marknaðarstjórin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran Óla Hammer, og hann møtir á nevndarfundum, tá spurningar viðvíkjandi sølu og marknaðarføring verða viðgjørdir.

**SMYRIL LINE BJÓÐAR**
Komandi sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line verður settur í eitt nýstovnað starv, sum hann sjálvur fær stóra ávirkan á. Talan er um eitt ógvuliga sjálvstøðugt starv við stórum frælsi.

Smyril Line er ein framsíggin og framtakssom fyritøka við einum høgum virkisstigi. Samverulagið í felagnum er óformligt, og starvsfólkini eru eyðkend fyri sín stóra eginánuga í arbeiðinum.

Rætti umsøkjarin fær góða løn og eftirløn.

**UMSÓKNIR**
Smyril Line hevur biðið headhunterfyritøkuna, SAM International A/S, leita eftir nýggja sølu- og marknaðarstjóranum. Til skulu allir fyrispurningar, umsóknir og CV stílast til:

**Headhunter Stig Kromann - Andersen**
Skovdalen 7
3500 Værløse
Danmark
Telefon: 0045 44 44 03 32
Teldubústaður: ska@sam-int.com

Seinasta freist at søkja starvið er 8. januar 2004. Allar umsóknir og fyrispurningar verða viðgjørd í trúnaði.